## Sakna stuðul

Á ársaðalfundi á Grækarismessu fekk Føroyingafelagið í Århus nýggja nevnd. Í henni eru Hergeir P. Vang, formaður, Finnur Jensen, næstformaður, Elin Jacobsen, skrivari, Eivind Simonsen, kassameistari og Jákup Olaf Johannesarson, sum er PR-limur. Øll í nevndini uttan formaðurin eru nývald. Nevndin sigur í tíðindaskrivi, at figgjarligu karmarnir hjá felagnum eru vánaligir, og at felagið saknar størri almennan stuðul úr Føroyum.

## Prestar mótmæla

Prestarnir í Nordfyn kommunu í Danmark hava sent kommunustýrinum eitt skriv, har teir mótmæla, at fólk, sum ikki hava ráð at rinda sína jarðarferð, verða jarðað í einari felags grøv, sum er ætlað ókendum. Teir 15 prestarnir halda, at framferðin hjá kommununi samsvarar ikki við ta kristnu uppfatanina, at øll eru líka nógv verd. Tí mæla teir komununi til at rinda jarðarferðirnar hjá teimum, sum ikki megna at rinda sjálvi.

# Stóri bygningurin er nú innilokaður

**- Sjálvandi er gerandisdagurin merktur av, at so umfatandi um- og útbygging fer fram, men øll sýna stóra ábyrgd og stórt fyrilit, sigur leiðslan í Tofta skúla**



*Arbeiðið er nú komið so langt, at ein rættiliga stórur partur av nýggja tilbygninginum, sum er bygdur norður úr verandi skúla, er innilokaðu*

SKÚLABYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*Vilmund@sosialurin.fo*

Í longri tíð hevur stóra um- og útbyggingin av Tofta skúla verið í gongd, men nú lovar Nes kommuna á síni heimasíðu, at umstøðurnar hjá næmingum og lærarum í skúlanum skjótt verða betri, enn tær eru í dag.

- Arbeiðið er nú komið so langt, at ein rættiliga stórur partur av nýggja tilbygninginum, sum er bygdur norður úr verandi skúla, er innilokaður.

Hesin bygningur er í trimum hæddum, og her verða fýra skúlastovur, høli til evning, námsfrøðiligur tænastudepil, hølir til serligan tørv, bólkarúm, goymslurúm, arbeiðsrúm hjá lærarum, skrivstovu- og leiðsluhøli, felagsøkir, wc og onnur smærri hølir.

Við heimasíðuna, sigur Óli Ludvig, byggifrøðingur og verkætlanarleiðari, at hóast ávísir trupulleikar hava verið við um-og útbyggingini, verður tíðarætlanin í høvuðsheitum hildin. Hetta merkir, at tann nýggi bygningurin, sum nú er vorðin innilokaður, kann takast í nýtslu komandi skúlaár – ella um miðjan august í ár.

Ætlandi verður øll um- og útbyggingin av Tofta skúla liðug um eitt ár.

Skúlaleiðslan sigur, at gerandisdagurin sjálvandi hevur verið merktur av stóru byggingini, men bæði byggifólk, næmingar og lærarar hava sýnt stóra ábyrgd og stórt fyrilit.

- Tí hevur gerandisdagurin hesa tíðina eisini gingið so væl, sum yvirhøvur gjørligt, sigur leiðslan.

# Svartkjafturin sp

**Mikudagin var Christian í Grótinum á Fuglafirði við 2000 tonsum av svartkjafti, og í dag kemur Fagraberg við fullari last. Á Havsbrún siga tey, at onnur skip, sum eru á svartkjaftaleiðunum sunnanfyri, eisini eru um at verða fullfermd**

SVARTKJAFTUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tá ið tað hevur viðrað, hava føroysku svartkjaftaskipini havt góðan fiskiskap á leiðunum sunnanfyri.

Góði fiskiskapurin hevur eisini slett av sær til Havsbrún í Fuglafirði, sum hevði fulla viku í síðstu viku, tá fleiri skip vóru inni og landaðu.

Mánadagin og týsdagin í hesi vikuni var eingin landing, og tá tóku tey á virkinum hond um ymiskt, sum var at gera.

### Fagraberg fullur

Mikudagin í hesi vikuni var fyrsti báturin so aftur á Fuglafirði. Tað var Christian í Grótinum, sum hevði eini 2000 tons av svartkjafti. Siglingin suður á leiðirnar, har skipini fáa svartkjaftin í løtuni, tekur tvey samdøgur, og í hesum førinum hevur tað tikið eina góða viku at fylla skipið.

Í kvøld kemur Fagraberg, sum er fyrrverandi Krúnborg, á Fuglafjørð. Enn einaferð er skipið fult, og spurningurin er, um Fagraberg hevur 3.000 ella 3.200 tons, sum skipið lastar.

Á Havsbrún siga tey, at fleiri svartkjaftaskip, sum eru á leiðunum sunnanfyri, eru um at vera fullfermd, og millum hesi eru eitt nú Finnur Fríði og Carlton, sum tey á Havsbrún hava vónir um at síggja á Fuglafirði í vikuskiftinum.

### Flytir seg

Á Havsbrún siga tey, at herfyri fingu skipini svartkjaft nakað longu norðuri, soleiðis at siglingartíðin av fiskileið tá var hálvt annað



samdøgur.

Síðan hava skipini leitað suðureftir aftur og hava aftur fingið væl, tá ið líkindini hava verið.

Tað vísir seg nevniliga, at fiskurin spjaðir seg, tá hann ruskar veðrið, og síðan noyðast skipini at leita




*Fleiri spyrja, hvar tey kunnu fáa fatur á Onnu Mariu Persson (265859) og Maluni Thomsen (515755)*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Fyritøkur ásanna

**Soleiðis finnur tú kvinnurnar, sum eru farnar undir eina nýggja tænastu til skrivstovufólk við vegleiðing um kropsburð, hvussu tú situr, tá tú arbeiðir, og hvussu tú setir amboðini á skrivstovuborðinum. Hevur tú longu fingið spenningar í rygg, akslar, armar ella háls, ført tú vøddarnar mýktar á arbeiðsplássinum**

TÆNASTA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nógvir lesarar hava vent sær til Sosialin og spurt, hvussu tey kunnu fáa fatur á teimum báðum kvinnunum, vit skrivaðu um í blaðnum herfyri. Talan er um Onnu Mariu Persson, vøddamýkjara og Maluna Thomsen, mensendiecklærara.

Báðar hava tær egið virksemið heima við hús, har Anna Maria hevur Viðgerðarstovuna í Hoyvík við mýking og strúking, og Malan hevur fólk, sum ganga til mensendieck-fimleik heima hjá henni.

Samstundis, sum tær báðar halda fram við egnum virksemi, bjóða tær sær nú í felag at vitja arbeiðspláss við vegleiðing um kropsburð, hvussu fólk eiga at sita, og hvar amboðini á skrivstovuborðinum eiga at standa.

Endamálið við hesi vegleiðing er, at fólk í størst møguligan mun skulu umgangast spenningar í kroppinum, tá tey sita á skrivstovuni dag um dag og ár um ár.

Men tænastan, sum tær báðar í felag veita arbeiðsplássum, røkkur longur enn so.